# Edward Fuglø millum ment




*Steinbjørn O. Jacobsen borgarstjóri saman við Halgir W. Arge oljuverkfrøðingi, sum hevur arbeiðir í oljuvinnuni í Wien. Hann býr í Wien saman við unnustu síni úr Klaksvík, Poulu Sjóstein, ið er pædagogur – Uttast til høgru Sunnuva Jacobsen, kona borgarstjóran*

**Sera áhugaverd framsýning lat upp um vikuskiftið í Leopold Museum í Wien. Hetta er ein stór og øðrvísi framsýning, ið varpar altjóða ljós á føroyska list og Føroyar í breiðari merking**

HUGLEIÐING

*Orð og myndir: Dávur Winther*

Hópin av røðum frá alkyns stjórum á Leopold savninum vórðu hildnar. Eisini kona Rudolf Leopold, sum var til staðar, helt røðu. Øll høvdu á orði, hvussu serstakt hetta lítla samfelagið Føroyar var við so ríkari søgu og siðsøgu. Føroyski dansurin, sum var varðveittur og kvæðini harvið eisini. Og so tann unga listin, sum var so rúgvusmikil og litføgur.

Men ikki minst nýtíðar fótbólturin hjá dugnaligu fótbóltstjóðini Føroyum, sum hevði sett Eysturríkið upp á pláss fyri nøkrum árum síðan, fekk mikla umtalu. Við byrjanarøðuna vórðu víst brot úr dystinum í Landskrona, tá Føroyar legði Eysturríki á knæ í fótbóltslandskapping á sinni.

Tony Ploster, ein tann kendasti leikarin hjá Eysturríki, var við til framsýningina og greiddi eitt sindur lotur frá óhugaligu viðferðini frá føroyska landsliðnum í Landskrona í síni tíð.

## "Culture Club" varpar ljós á framsýningina.

Øll framsýningin má tó sigast at standa í ljósinum av "Culture Club", sum Edward Fuglø hevur málað – og sum Klaksvíkar býráð eigur.

Kápumyndin á skránni hevði brotmyndir úr "Culture Club", innbjóðing til danska umboðsmannin aftan á at framsýningin hevði latið upp, hevði "Culture Club" sum ímynd.

Ein stórur maður gekk runt í framsýningarhølunum ílatin sum ein yvirvaksin lundi og bar runt skráir til kvøldið – Lundar í klæðningi er jú motivið í "Culture Club".

Ætlanin er, at hávaksni maðurin skal ganga í miðbýnum í Wien í lundabúna og á henda hátt veita savninum hópin av vitjandi, sum vilja sleppa at síggja føroysku listaframsýningina, ið verður kallað: Nýtíðarlist úr Føroyum: 16.05. – 07.09.08.

## Tíðindafólk vístum stóran áhuga

Aftaná vildu tíðindamenn hava tonna á Edward Fuglø fyri at vita, hvat lá aftan fyri hesa serstøku mynd, sum hekk til háborðs í savninum á mest ásýniliga staðnum. Myndin hevði vakt so mikla umtalu. Millum tíðindafólkinin vóru SvF og ORF.

Fyrr um dagin var tíðindafundur, har eini 60 tíðindafólk møttu frá øllum handans fjølmiðlastøðum í Eysturríki.

## Triðmest vitjaða listasavnið í Eysturríki

Og vitjanum plagar ikki at skorta. Leopold savnið er tað triðja í røðini av mest vitjaðum listasøvnum í Eysturríki. Í Wien búgva o. u. 1,5 milliónir fólk – og har eru ein heilur hópur av kendum søvnum. Onkur vil vera við, at tá ið tú ert sloppin inn um á Leopold, ert tú so nær Mekka í listaheiminum, sum til ber.

- Og best av øllum: Tað er sjálvur doktarin í listfrøði á Leopold Savninum: Micheal Fuhr, sum hevur verið í Føroyum og sett hesa framsýning saman. Ikki kann sigast annað enn, at hann hevur rakt væl, og at vit føroyingar kunnu vera fegnir.

Longu nú er avtalað, at eitt ferðalag á 30 fólk koma til Føroya úr Wien í summar, sum onkusvegna hava tilknýti til vinnuna og litaheimin í Eysturríki.

## Landsstýriskvinnan væl fagnað

Kristina Háfoss, landsstýriskvinna í mentamálum umboðaði landsstýrið hábærsliga. Hon byrjaði fyrst á týskum, skifti yvir til enskt og rundaði av á týskum – ræðið. Hon undirbygdi tað, sum vertirnir vistu um Føroyar og undirstrikaði týdningin av slíkari stórfingnari listaframsýninig úti í heimi. Framsýningin hevur stóran týdning fyri føroyskt lita- og mentanarlívið; men ikki minst fyri Føroyar á øllum økjum.

Kristina Háfoss varð sera væl fagnað av stóru áhoyrarafjøldini.

Helgi Fossadal umboðaði Føroya Listasavn, borgarstjóri í Tórshavn, Heðin Mortensen og eisini borgarstjórin í Klaksvík; Steinbjørn O. Jacobsen vóru við til upplætingina av framsýningini á Leopold Listasavninum í Wien. Fleiri aðrir føroyingar vóru eisini til staðar.





*Nógv fólk lýddu á, tá Kristian Háfoss setti framsýningina á Leopold savninum í Wien. Hon legði fyri á týskum, síðani tosaði hon á enskum, fyri aftur at runda av týskum - ræðið*

*Mynd: Dávur Winther*